# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Hvørki HB ella B36 eru longur partur av kappingini um Løgmanssteypið, og tað leggur eyka trýst á liðini undan sunnudegnum*

# Fyrsta slagið um Havnina

**Odda- og lokaldystur verður í Gundadali sunnudagin, og í aðrar mátar tykist talan aftur hesa ferð vera um sera áhugavert umfar í Vodafone-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsta av trimum grannauppgerðum í Gundadali er á skránni sunnudagin.

Undan kappingarárinum mundu tey flestu viga HB nakað væl tyngri á vágskálini, har FM-favorittarnir vóru viðgjørdir, og tann støðan er enn ikki broytt tað heilt stóra.

Men á stigatalvuni eru grannarnir úr B36 framvegis heilt væl við. Talan var um bakkast, tá B36 seinasta vikuskifti mátti lúta í Sørvági, men dysturin sunnudagin er teirra møguleiki at reisa seg, eins og hetta er dysturin, har B36 skal prógva, um liðið veruliga skal spæla við millum tungu dreingirnar, ella um góða byrjanin heldur er úrslit av eini lagaligari kappingarskrá.

HB hevur hinvegin sítt at spæla fyri. Mikukvøldið vóru teir enntá varpaðir úr steypakappingini, og einki sum helst er at ivast í, at teir vilja nýta sunnudagin at vinna sær sína uppreisn.

### Eysturoyaruppgerð

Í Runavík verður eisini grannauppgerð, tá NSÍ tekur ímóti B68.

Har er støðan undan dystinum, at NSÍ er á odda í Vodafone-deildini, og heilt víst vilja vespurnar gera sítt til at tryggja, at tann støðan er óbroytt, tá klokkan er farin um teir 17 tímarnar sunnudagin.

B68 hevur hinvegin ikki fingið bestu byrjanina, og meira enn nakar annar er hetta dysturin, har toftamenn vilja skava sær nøkur stig afturat á kontina.

### Botnuppgerðir

Hinir báðir dystirnir hetta vikuskiftið eru millum fýra av teimum fimm niðastu liðunum á talvuni.

Í Fuglafirði batnaði lagið nakað, tá teir seinasta sunnudag bastu toftamonnum, og tað úrslitið vilja teir byggja víðari uppá, nú KÍ kemur á vitjan.

KÍ er hinvegin í tungum sjógvi. Fyrstu fýra umførini hava bara kastað tvey stig av sær, og ikki minst mundi tapið móti AB vera herskin biti at svølgja Og tí hava teir meira enn nakrantíð tørv á at reisa seg.

Seinasti dysturin hetta umfarið verður mánadagin, tá Víkingur tekur móti 07 Vestur.

## Dystir um vikuskiftið

**Vodafone-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 03.05 | ÍF-KÍ | Rúni Gaardbo |
| 03.05 | NSÍ-B68 | Lars Muller |
| 03.05 | B36-HB | Petur Reinert |
| 03.05 | AB-07 Vestur | Páll Augustinussen |
| 04.05 | Víkingur-EB/S | Dagfinn Olsen |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 02.05 | VB/S-NSÍ | Høgni Hansen |
| 02.05 | Víkingur-TB | Andrew Christiansen |
| 02.05 | B71-Skála | Bárður Mortensen |
| 02.05 | FC Hoyvík-HB | Alex Troleis |
| 02.05 | MB-B68 | Rói Jacobsen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 03.05 | AB-EB/S | Pætur Albinus |
| 03.05 | B36-B71 | Jóhan P. Michelsen |
| 03.05 | TB-ÍF | Sólfinn Gudmundsson |
| 03.05 | Undri-Víkingur | Allan Manai |
| 03.05 | 07 Vestur-KÍ | Jákup M. Kjell |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 03.05 | Víkingur-EB/S | Jóhan M. Stenberg |
| 03.05 | B68/NSÍ-AB | Elias Andreasen |
| 03.05 | Skála-KÍ | Jákup L. Stenberg |